# Kjak



**Heini Eysturoy**
*leiðari á vegadeildini Landsverk*

## Ábyrgdin av steðgaða innkomuvegnum er tín, Heðin Mortensen

Borgarstjórin í Havn ger enn einaferð ilt av sær í bløðunum, har Landsverk fær skyldina fyri, at arbeiðið við innkomuvegnum til høvuðsstaðin steðgaði. Fyri at eingin misskiljing skal vera, er tað soleiðis, at tvær fortreytir skulu vera til staðar, tá ein vegaverkætlan verður framd av Landsverki.

Landsstýrið og Løgtingið skulu hava samtykt at gera verkætlanina og játtað pening, og aðrir viðkomandi myndugleikar skulu góðkenna verkætlanina. Í málinum við innkomuvegnum varð peningur játtaður til endamálið, og viðkomandi myndugleikar góðkendu ætlanina. Kommunali myndugleikin er ikki beinleiðis myndugleiki, tá tað kemur til landsvegagerð, men sjálvandi var neyvt samstarv við Tórshavnar Kommunu um verkætlanina.

Undirlendið oman fyri Villingardalsvegin varð fingið til vega frá kommununi, men bráddliga komu boð frá borgarstjóranum um, at hetta kortini ikki kundi lata seg gera. Orsøkin var, at Tórshavnar kommuna ikki kundi góðtaka, at vegaføringin lá oman fyri Villingardalsvegin. Sostatt varð neyðugt við tunli, um verkætlanin skuldi gjøgnumførast.

Táverandi landstýrismaður vildi ganga ynskinum á møti, treytað av, at Tórshavnar kommuna rindaði meirkostnaðin. Tað vildu borgarstjórin og kommunan ikki, og tí steðgaði arbeiðið.

Hetta er tann faktuelli veruleiki um innkomuvegin. Alt annað, sum borgarstjórin nevnir í svarinum, eru ógrundaðir pástandir. Harafturat roynir Heðin Mortensen at grugga myndina við at draga fullkomiliga óviðkomandi viðurskifti inn í málið. Ivaleyst fyri at fjala út yvir tað, sum í veruleikanum er hent í hesum máli.

Tá borgarstjórin leggur Landsverk undir at, "at gera sum tað passar stovninum", "ikki rætta hond frá síðu", "súlta" og annað, er tað í ólukkumát ein yvirmeting av valdinum hjá Landsverki. Stovnurin ger bert tað, ið avvarðandi landsstýrisfólk og Løgtingið gera av, og sum og aðrir viðkomandi myndugleikar góðkenna. Í hesum sambandi kunnu vit upplýsa, at tillutaða játtanin er brúkt í tann mun, hetta hevur verið møguligt. Í teimum førum hon ikki er brúkt, hevur orsøkin millum annað verið viðurskifti, ið Landsverk ikki hevur havt nakra ávirkan á. Millum annað lendiskeyp. Hetta er í stuttum gongdin við innkomuvegnum, til kommunan – við Heðini Mortensen á odda – steðgaði arbeiðinum.

Til síðst kann nevnast, at Landsverk sjálvandi metir tað vera rætt at gera nýggjan innkomuveg til Havnar, og stovnurin hevur ár undan ári mælt til at seta pening av á fíggjarlógini til endamálið.



**Bergtóra Høgnadóttir Joensen**

## Hugburðsbroyting til stakar uppihaldarar

*Kveikjandi fundurin um stakar uppihaldarar í Miðlahúsinum miðvikukvøldið, har Siri Hansen og Annika Antoniussen løgdu serritgerð sína um stakar uppihaldarar fram, var stak áhugaverdur.*



Eg vænti, at júst hetta at tað áhaldandi verður varpað ljós á hendan málbólkin ger sítt til at skapa eina harðliga tiltrongda hugburðsbroyting.

Havi nú sitið á tingi í gott tvey ár. Lat meg nevna nakrar útsagnir, eg rodnandi havi lagt oyrað til frá tingsins røðarapalli um stakar uppihaldarar:

»Vit mugu ansa eftir, at støku uppihaldararnir ikki fáa tað ov gott, tí so fara so nógvar familjur í upploysn!«

»Tað er jú ein trupulleiki, tá vandi verður fyri, at skipanin kann misnýtast...so at fólk sum í veruleikanum ikki eru støk, kortini fáa stuðul!«

»Velur mann at verða stakur uppihaldari, má mann eisini taka ábyrgd av tí!«

### Børn í lutvísum fátækradømi

Flestu føroysku politikarar eru ímóti fríari fosturtøku. Júst tí kundi ein trúð, at øll børn sum blivu fødd og vuksu upp í Føroyum høvdu fantastiskar umstøður. Men – so er ikki.

Syrgiligt var at hoyra tær – Siri og Anniku - bera fram,

**_Tað er so nógv vit kunnu gera!_**

á hvønn hátt summi børn liva í lutvísum fátækradømi í Føroyum. Lat meg geva nøkur dømi:

- Børn eru sum fáa kálktablettir, tí peningur ikki er til mjólk
- Tey hava ikki altíð ráð til at halda barnaføðingardagar
- Skulu flyta ofta
- Yvirliva, tí tey fáa mat frá familjuni

### Bæði mugu rinda

Í løtuni er uppskot um at lækka stuðulin til uppihaldspening (pápapengar) úr 40% niður í 20%. Men tá samgongan ikki fær undirtøku fyri hesum uppskoti, fara ongar broytingar fram. Eitt hugskot kundi verið, at mamman og pápin í felag rinda tær útreiðslur, sum eitt barn jú eisini er. Siri og Annika søgdu, at mánaðarligu útreiðslurnar eru á leið 4.500 kr mánaðarliga fyri eitt barn, sum er 5 ár í Føroyum. Mátti veri sjalvsagt, at mamman og pápin rindaðu helvt um helvt av hesari upphædd. Hetta var eitt uppskot millum áhoyrarnar í Miðlahúsinum. Haldi hugskotið vera stak skilagott.

### Framburður – hóast alt

Nýti eg mín allarjaligasta vilja, minni eg meg sjálva á, at smávegis skilagóðar broytingar hóast alt eru framdar í verandi valskeiði. Lutvís stuðul til stakar uppihaldarar og lutvís hækkaður lestrarstuðul til stakar uppihaldarar. Veit, at tað ikki er nóg mikið. Men tað er at fegnast um, at hóast konservatisman er rævandi ógvuslig í føroyskum politikki, so er nú fest á blað og í lógartekstir, at familjur, har talan er um stakar uppihaldarar, eisini finnast her á landi. Onkursvegna hevur politiska skipanin tá ásannað, at tað finnast aðrir familjuformar í Føroyum enn sonevnda kjarnufamiljan.

### Gera politikarar sær dælt?

Ein avvarðandi hjá einum sálarsjúkum bleiv herfyri endurgivin fyri at siga, at: »politikarar gera sær dælt av teim avvarðandi!« Helst er hetta so – eisini í mun til stakar uppihaldarar...og tíverri eisini í mun til aðrar málbólkar.

Vit mugu – ongantíð ov skjótt – veruliga taka støðu til føroyskan sosialpolitikk. Tað er so nógv vit kunnu gera!